# Nýggjur stjóri á Kollafjord Pelagic

**Dánjal Jákup Andreasen sleppur nú at royna, um hann saman við sínum fólki kann megna at skapa lønandi vinnu á Kollafjord Pelagic**

STJÓRASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stjórin á Kollafjord Pelagic eitur ikki longur Sofus Poulsen, sum í fleiri ár var stjóri á Rækjuvirkinum á Oyri, men sum í seinastuni hevur verið stjóri á pelagiska virkinum í Kollafirði.

Maðurin, sum er komin í hansara stað, er Dánjal Jákup Andreasen, ið hevur drúgar royndir sum fiskavirkisstjóri, eitt nú á Fiskavirkinum í Vestmanna.

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á fyrrverandi stjóranum, Sofusi Poulsen, men hann var ikki at hitta. Vit royndu eisini at fáa fatur á Dánjal Jákupi, men hann var á fundi í Havn.

Nevndarformaðurin í Kollafjord Pelagic, Sverri Hansen, hevur seinastu dagarnar verið í Føroyum – og fer ætlandi avstað aftur til Íslands í dag, men heldur honum fingu vit fatur á, áðrenn blaðið fór til prentingar.

### Longu byrjaður

Sum skilst, byrjaði Dánjal Jákup Andreasen í nýggja starvinum hósdagin, samstundis sum Sofus Poulsen gavst í hesi vikuni.

Tað hevur gingið striltið hjá Kollafjord Pelagic, síðan virkið varð bygt í Kollafirði fyri nøkrum árum síðan.

Ymiskar umbyggingar eru framdar á virkinum, og nýggj útgerð er sett upp, eins og felagið er vorðið endurskipað. Men líkt er til, at tað er torført at fáa lønandi virksemi innan víðu veggirnar í stóra bygninginum á havnalagnum í Kollafirði.

Sosialurin hevur skilt, at ongar broytingar eru farnar fram í nevndini aftanfyri Kollafjord Pelagic.



*Líkt er til, at torført er at fáa lønandi vinnu innan víðu veggirnar á pelagiska virkinum í Kollafirði, Kollafjord Pelagic. Nú fær so Dánjal Jákup Andreasen høvi at royna seg eftir Sofus Poulsen, ið er farin frá sum stjóri*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## P/F 14 hjá Poul Mohr

**Kjartan Mohr er nýggjur nevndarlimur í P/F Sandoy Seafood eftir endurreisingina av felagnum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í samband við, at P/F 14, sum er eitt partafelag hjá Poul Mohr, hevur sett pening í P/F Sandoy Seafood, er sonur Poul, Kjartan Mohr, komin í nevnd felagsins.

P/F Sandoy Seafood er felagið, sum eigur og rekur fiskavirkini á Sandi og í Skopun.

### Gamalt felag

Poul Mohr sigur, at P/F 14 hevur sett nakað av peningi í P/F Sandoy Seafood fyri at hjálpa virkjunum í Sandoynni í gongd aftur, sum hann tekur til.

Spurdur, hvaðani navnið á partafelagnum, P/F 14, stavar, sigur hann, at hetta er eitt rættiliga gamalt felag.

- Hetta er eitt felag, sum er stovnað í 1936 – og navnið P/F 14 stavar frá, at hetta felag var nummar 14 í partafelagsskrásetingini í sínari tíð, sigur Poul Mohr.

## Atlantic Navigator kemur fyri Næraberg




*Atlantic Nagivator er nógv størri enn Næraberg, sum vit síggja á hesi myndini. Væntandi verða væl omanfyri 100 fólk við skipinum, sum ætlandi verður ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum til heystar*

**Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur nú givið JFK-Troli innflutnigsloyvi til risatrolaran, Atlantic Navigator, sum er fyrrverandi American Monarch**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gongst sum ætlað, verður risatrolarin, Atlantic Navigator, sum er fyrrverandi American Monarch, ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum til heystar.

Sambært Norðlýsinum, sum er lokalblaðið hjá norðoyingum, hevur landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, í vikuni givið JFK-Troli innflutningsloyvi til risatrolaran, sum ætlandi kemur í flotan í staðin fyri hin risatrolaran, Næraberg.

### Til heystar

Í samrøðu við Norðlýsið, sigur reiðarin hjá JFK-Troli, Hanus Hansen, at gongst sum ætlað, kemur Atlantic Nagivator higar til lands einaferð í heyst.

- Nú verður arbeitt við at fáa fíggingina upp á pláss, og gongur alt sum ætlað, vænta vit, at trolarin verður klárur at fara til fiskiskap fyri Næraberg einaferð í heyst, sigur Hanus Hansen.

Manningin umborð á Nærabergi telir eini 80 fólk, men Atlantic Navigator er eitt munandi størri skip, og tí er væntandi, at manningartalið við hesum skipinum verður væl omanfyri 100.

## Helena landar mánadagin

**- Tað hevur bara verið heilt fitt av fiskaarbeiði í vár, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari á Fiskavirking í Miðvági**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Eini 60-70 fólk eru til arbeiðis á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági, tá ið fullmannað er. Tey arbeiða hýsu, sum verður virkað til portiónir. Ein minni partur av framleiðsluni fer í blokk, kanska ein triðingur ella so.

Størsti parturin av rávøruni kemur frá línubátunum.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at væl av arbeiði hevur verið á virkinum í vár.

- Tær fyrstu tvær vikurnar í januar var lítið og einki at gera, men síðan hevur bara verið heilt fitt av arbeiði.

Hann vísir á, at á middegi mikudagin var aftur turt gólv á virkinum, og síðan hevur einki verið at gjørt í gjár og í dag.

Men mánadagin fara tey aftur til arbeiðis í Miðvági. Tá kemur línubáturin, Helena, sum er heimahoyrandi í Klaksvík, á Miðvág at landa.

### Smáur fiskur

Jason Johannesen vísir á, at hýsan hjá línubátunum hevur verið smáfallandi, men tað hevur gingið hampiliga væl at fingið fatur á henni. Ein fittur partur av veiðini hjá bátunum er hýsa, sum vigar minni enn eitt kilo.

- Tað vísir seg, at allur fiskur er smáur. Hýsan er smá, upsin er smáur, og toskurin er eisini smáur.

Jason hevur heft seg við tað, sum ein skipari segði í Sosialinum herfyri. Hesin vísti á, at gýtingarupsin er nógv smærri nú enn fyri nøkrum árum síðan.

Tað verður helst soleiðis, sigur Jason, at tá ið myndugleikarnir í framtíðini skulu friða gýtingarfisk, so verður tað tann smái fiskurin, sum verður friðaður!

- Alt er so undarligt vorðið, heldur virkisleiðarin fyri.